# Tríggjar fráboðanir til Badmintonhøllina

**Leygarkvøldið var ársins DJ show í Badmintonhøllini, og tríggjar ferðir varð løgreglan boðsend á staðið**

LØGREGLUTÍÐINDINI
*Solby A. Eliasen*

Tað vóru fráboðanir um ófrið í Badmintonhøllini, sum løgreglan fekk. Í tí eina førinum var talan um eina gentu, sum segði seg vera sligna. Men vakthavandi sigur, at tað talan var um eitt hendiligt óhapp.

– Tað vóru tveir, sum vóru farnir til hendurs, og kontrollarnir royndu at skilja sundur. Henda gentan er so komin at standa í millum ella fyri á ein ella annan hátt, so tað var ikki tilætlað henni, greiðir vakthavandi frá.

Hini báðar fráboðaninar vóru ávíkavist bardagi og ein, sum tørvaði hjálp at koma til hús. Bardagi var í millum tveir uttanfyri høllina, men løgreglan kom á staðið og trupulleikin varð loystur á staðnum. Og ein ungur drongur var so ávirkaður, at hann ikki megnaði at vinna upp hús sjálvur, og tískil koyrdi løgreglan hann til hús.

Ein sjúkrabilur var eisini boðsendur til Badmintonhøllina. Ein drongur var komin til skaða í beinið, men sum skilst, so var tað ikki orsakað av harðskapi.

– Tað er keðiligt, at onki tiltak kann vera í Badmintonhøllini, uttan at okkurt hendir, og løgreglan verður boðsend fleiri ferðir, sigur vakthavandi, sum ikki dugir at siga hví tað er so. Hann sigur eisini, at onnur tiltøk eru ofta aðrastaðni í høvuðsstaðnum uttan at løgreglan fær so nógvar fráboðanir um at koma á staðið.

Vakthavandi sigur, at tað góða veðrið í vikuskiftinum hevði við sær, at nógv fólk var í býnum. Og tá fær løgreglan altíð nógvar fráboðanir. Hetta vikuskiftið hava fólk eisini klagað um, at tað verður bankað upp á hjá teimum til fortreð, tónleikur spælir hart í gøtunum og fleiri fólk sova úti.

– Tað vil altíð verða so, tá nógv fólk savnast. Og tað eru jú ikki bara fólk her á Streymoynni, men Eysturoynni og Vágoynni nú eisini. So tað verður til nógv fólk, sigur vakthavandi á løgreglustøðini.

# Razz kemur til Føroya



*Unglingin Razz, sum er eitt stórt navn í donskum tónleiki, kemur í mars mánaði til Føroya*

**Helst størsta barnastjørnan í donskum tónleiki í løtuni kemur til Føroyar í mars mánaði. Danski hiphopparin Razz fer at hava tvær framførslur**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Fyrsti vinnarin av norðurlendska Grand Prixnum fyri børn, sum varð hildið í fjør, var ein danskur unglingi. Hann kallar seg Razz, tá ið hann er á ferð við tónleikinum, og í næsta mánaði kemur hann til Føroya at syngja.

Lívligi og eygagóði sangarin dugir væl at vera á einum palli. Hann rappar, syngur og dansar, og hann hevur selt nógvar fløgur á danska marknaðinum.

Fyrsta fløga hansara, Kickflipper, sum kom út í fjør, fekk platin-virðisløn, tey kalla. Tað verður givið, tá ið 50.000 eintøk eru farin um diskin.

## Tvær framførslur

Nú er Razz í ferð við at gera eina nøggja fløgu, sum kemur út um stutta tíð, og eftir hesa útgávuna skal hann á eina umfatandi konsertferð í Danmark.

Konsertferðin røkkur eisini til Føroya, tí sunnudagin 9. mars kann hann upplivast á føroyskum palli.

Hendan dagin fer drongurin úr Aalborg at hava tvær framførslur – fyrst á Platform í Havn og síðani í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

# Fleiri smærri ferðsluóhapp

**Vakthavandi á politistøðini sigur, at fleiri smávegis ferðsluóhapp hava verið í vikuskiftinum**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Solby A. Eliasen*

Tveir bilførarar vórðu tiknir fyri rúsdrekkakoyring. Annar rendi á kirkjugarðin við Velbastaðvegin tíðliga sunnumorgunin. Fólk sóu tilburðin og boðaðu løgregluni frá. Bæði maður og bilur vórðu funnir seinni, og bilførarin verður skuldsettur fyri rúsdrekkakoyring. Hin varð tikin av løgregluni, tá hon gjørdi ferðslukanningar sunnumorgunin.

– Annars hava eini fimm ella seks smærri óhapp verið um vikuskiftið, men tey hava fyri tað mesta verið av ósketni. Fólk hyggja seg ov illa um, tá tey eitt nú skulu bakka, og tí henda óhapp, men tíbetur hevur ongin persónur fingið skaða, sigur vakthavandi.





Bygningsbroyting og leiðaraskifti í Runavík:

# Skal merkjast í framtíðini

*Nýggi leiðarin á deildini hjá Sparikassanum í Runavík, Jónleif Th. Jacobsen, saman við nýggja varaleiðaranum, Kristine Ellingsgaard*





*Deildarleiðarin í Suðuroyar Sparikassa í Havn, Jóannes S. Hansen ynskir Jónleif Jacobsen tillukku og góða eydnu*

**Tann 1. februar tók Jónleif Th. Jacobsen við sum deildarleiðari á deildini hjá Føroya Sparikassa í Runavík. Kristine Ellingsgaard er sett sum varaleiðari. Jónleif Th. Jacobsen sigur, at við leiðaraskiftinum verður eisini ein broyting framd, og er tað, at allar deildirnar í Eysturoynni koma nú so at siga at virka undir deildini í Runavík**

LEIÐARASKIFTI
*Orð: Ingrid Bjarnastein*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

– Leiðaraskifti er ein náttúrligur partur av gongdini, síðani Sparikassin varð skipaður um til partafelag í fjør, sigur Jónleif Th. Jacobsen, nýsettur leiðari á deildini hjá Føroya Sparikassa í Runavík.

Gamli leiðarin, Tummas Jacobsen, fer nú í annað starv á høvuðsdeildini hjá Føroya Sparikassa Yviri við Strond í Havn. Tummas hevur annars verið leiðari í Runavík í eini fimtan ár.

Við leiðaraskiftinum í Runavík fer eisini ein bygnaðarbroyting fram. Deildirnar í Eysturoynni, sum hava virkað sum fýra sjálvstøðug øki, eru tey nú savnaðar í eitt øki, og er Jónleif sostatt vorðin deildarleiðari fyri alla Eysturoynna.

Kristine Ellingsgaard er sett sum varaleiðari, og er tað sjálvsagt eisini fyri alla oynna.

– Vinnukundar fara onga broyting at merkja, tí alt arbeiðið hjá teimum er umsitið úr Runavík frammanundan og fara vit at halda fram við tí, sigur Jónleif.

– Privatkundunum kunnu vit hinvegin veita eina betri tænastu. Privatkundarnir í dag krevja nógva ráðgeving, og her hava vit valt, at fólkini, sum vegleiða teimum fara at hava betri kompetencu, so at tað verður tað sama um tey koma inn á eina deild á Strondum ella á Eiði. Hinar deildirnar í oynni koma at virka sum ein forlongdur armur hjá deildini í Runavík.

Arbeiðið hjá Kristinu Ellingsgaard, varaleiðara, verður at samskipa dagliga arbeiðið og aðarar aktivitetir.

– Eg haldi, at hetta er ein stór avbjóðing, og eg rokni við at tað verður ógvuliga spennandi. Serliga nú vit hava valt at skipa arbeiðið á tann hátt, vit hava. Og eg giti, at hetta er nakað, sum kemur at merkja virksemið framyvir.

Fríggjadagin varð móttøka á deildini í Runavík fyri fráfarandi og nýsetta leiðaranum og varaleiðaranum. Nógv fólk komu á gátt at hitta tey trý. Borgarstjóri, stjórar úr Havn, politikarar og onnur stukku framvið at ynskja teimum trimum góða eydnu í framtíðini.



*Borgarstjórin í Runavík, Rodmundur Nielsen, var eisini komin at heilsa uppá nýsettu leiðararnar. Til vinstru sæst Lasse Klein*



*Bjarni Olsen, Sparikassastjóri, var eisini komin at heilsa uppá nýggju leiðararnar*